ART og Spren Rex:

# Rokkur í vildensky




TÍÐINDASKRIV

Fýra av teim allarbestu rokkbólkunum í Havn fara um vikuskiftið at samla pening inn til at senda ein teirra til Danmarkar í januar.

48 Pages fara at luttaka á størsta ungdómstónleika festivali í Europa, har yvir 200 bólkar spæla fyri hvørjum øðrum og einum lurtaraskara sum vanliga er eini 40-50.000 børn og ung.

Tá tað jú er kostnaðarmikið at ferðast til Danmarkar, hava teir saman við The Story Ends, Lama Sea og Onkikanndiskuterast. altkann, tikið stig til Totalt Knockout Rokkshow, konsertir í Vertshúsinum fríggjakvøldið 12. og á Margarinfabrikkini leygarkvøldið 13. novembur. Konsertirnar byrja kl 22.00.

48 Pages, sum hava verið sera virknir síðsta árið, lova at teir ikki ætla at standa aftan fyri, tá teir seinast vóru í Vertshúsinum og rokkaðu kjallaran saman við bólkinum 200.

M.a. hevur Eyðun verið í Klaksvík og selt súklur, og hann sigur seg vera stak væl fyri og gleðir seg óført. Frans the Galán hevur smurt sær røddbondini og hóttir við at stemma guitaran. Bartal og Bjartur ætla sær so í hvussu so er at sleppa bumbunum, so at luft kemur undir 48 Pages.

Lama Sea eru eisini í toppform og teir lova eisini at teir fara at fýra ógvusliga uppundir grýturnar við teirra sermerkta up-town bullkukk rytmum.

Sangarin/guitaristurin í The Story Ends, Filip, hevur havt fingurin ov langt frammi og er vorðin skaddur, so teir hava fingið kendu guitarhetjuna Frans "The Man" Galán at hjálpa teimum.

Onkikanndiskuterast.altkann verða sum ikki eina ferð ein tann mest rokkandi sextettin við 3 guitarum í landinum. Sum teir siga" onki er sum tað sær út til at vera, hevur tú nakrantíð brotið beinið ?"

Vónandi verður ein dekans rúgva av fólki til konsertirnar, so vit kunnu senda 48 Pages til Danmarkar við manér í januar, har teir skulu umboða yngra ættarliðið av føroyskum rokktónleikarum.





# Ísraelsdagur í Klaksvík

ÍSRAELSDAGUR
*Tíðindaskriv*



Leygardagin 13. november skipar Ísraelsmissiónin fyri evnisdegi um Ísrael og missión í KFUM & K í Klaksvík. Aðalskrivarin í norsku Ísraelsmissiónini, Rolf G. Heitmann, kemur at tala.

Rolf Gunnar Heitmann kennir væl til missiónsarbeiðið í Ísrael. Hann hevur í nógv ár verið í starvi innan norsku Ísraelsmissiónina, harav tey síðstu sjey sum aðalskrivari. Umframt at kenna væl til messianskar jødar, so kennir hann eisini væl til viðurskifti hjá kristnum arábarum.

Rolf hevur tvær ferðir áður verið í Føroyum.

Ymisk evni, ið hava við Ísrael og missión at gera, verða tikin fram á evnisdegnum.

Dagurin byrjar klokkan 14 við evninum 'Ísrael og kirkjan - tvey gudsfólk?'. Kl 15 er kaffi og kl. 15:30 er 'Nýtt úr Ísrael'. Tað síðsta evnið á evnisdegnum er klokkan 16, og tað hevur heitið 'Evangeliið fyri jøda fyrst (Róm 1,16)'

Á evnisdegnum verður eisini møguleiki at seta spurningar. Høvi verður eisini at keypa bøkur, ið hava við Ísrael og missión at gera.

**Møti**

Umframt evnisdagin í Klaksvík talar Rolf eisini á møtum um landið. Hóskvøldið 11. november talar hann í missiónshúsinum í Kollafirði. Fríggjakvøldið talar hann á ungdómsmøti í Missións- & ungdómshúsinum á Glyvrum. Leygarkvøldið talar hann í missiónshúsinum Emmaus í Klaksvík yvir evnið 'Alt Ísrael skal verða frelst (Róm 11,25)'. Sunnudagin 14. november prædikar hann í Fuglafjarða kirkju og sunnukvøldið kl. 18 talar hann á møtinum í Meinigheitshúsinum í Havn.

SOSIALURIN HEVUR FINGIÐ NÝGGJ NUMMUR

tel 34 18 00

fax 34 18 01



## Svimjikapping í Leirvík

SVIMJIKAPPING

Árliga Rekastevnan hjá Svimjifelagnum Reki í Leirvík verður nú um vikuskiftið

Hetta er kapping fyri bólkarnar 1, 2 og 3 og einir 195 svimjarar úr øllum 8 svimjifeløgunum fara at luttaka.

Byrjað verður fríggjakvøldið kl. 20 við bólki 3. Tey halda fram kl. 9 leygarmorgunin. Tá tey eru liðug, svimur fyrst bólkur 1 og síðan bólkur 2.

Hetta er triðja Rekastevnan, síðan Svimjifelagið Reki bleiv endurstovnað. Áhugin fyri svimjing er stórur í Leirvík, serliga tí tað hevur gingið sera væl hjá svimjarunum í bólki 1 og 2. Tí vónar Reki, at fólk fara at koma fjølment at hyggja eftir kappingini.

# Bjørt Samuelsen skal kunna frá Løgmansskrivstovuni



KUNNINGARVIRKSEMI

Bjørt Samuelsen í Havn er sett í starvið sum kunningarrágevi á Løgmansskrivstovuni.

Hon er 39 ára gomul og útbúgvin tíðindafólk. Hon hevur í mong ár arbeitt á fjølmiðlaøkinum í Føroyum og uttanlands. Hon búði í Noreg í nøkur ár og starvaðist tá hjá NRK. Í Føroyum var hon fyrst í Útvarpi Føroya og seinni í Sjónvarpi Føroya.

Tað var nýggja samgongan, sum í samgonguskjalinum setti sær fyri, at fyrisitingin skuldi gerast meira opin og einføld fyri brúkararnar, og tí varð starvið lýst leyst herfyri.

Bjørt Samuelsen byrjar í starvinum longu hálvan desember, og er starvið tíðaravmarkað til trý ár. Fjúrtan fólk søktu starvið.

